

# 11.000 størv á boripallum í vanda

**Jógvan Hugo Gardar**

29.06.2015 - 10:45

Oljan.fo

Seinastu uppteljingarnar vísa at nú eru 11.000 størv á boripallum í vanda fyri at hvørva næstu 30 mánaðirnar.

- Nú er tíðin komin at oljufeløgini og myndugleikarnirtraðka til, sigur Jørgen Arnesen í samrøðu við Stavanger Aftenblad. Hann erstjóri í einum av stóru eigarunum av boripallum, COSL.

Í farnu viku noyddist kinverska felagið COSL at koyra 229 starvsfólk í Noregi, aftaná at Statoil segði upp eina avtalu um leigu av COSL Pioneer.